## Byin.fo, nýggja andlitið í náttarlívinum í Havn

Fimm av best umtóktu barrunum, diskotekunum og klubbunum í Havn hava fingið egna heimasíðu. Á henni ber til at hava fingurin á pulsinum.

Tá fyritøkan handan Cippo og Manhattan legði saman við fyritøkuni handan, Rex, Café Natúr og Eclipse varð bróðurparturin av náttarlívinum í Havn savnaður undir einum samtaki. Hetta felag hevur nú fingið eitt andlit á alnetinum, byin.fo. Á heimasíðuni eru myndarøðir úr náttarlívinum, sprundið hetta vikuskiftið og skráin fyri tiltøk, ið verða komandi tíðina. Eisini ber til at koma við viðmerkingum á síðuni.

-Hetta er okkara egni portalur, her kunnu vit kunna um okkara virksemi bæði tað komandi og tað farna, sigur Rúni Djurhuus, ið er ein av monnunum handan samtakið.

**nud**




# Føroysk list í Íslandi

**Í gjár kl 17:00 lat upp stór framsýning av føroyskari list á listasavninum "Hafnarborg" í Hafnafirði beint við Reykjavík**

MYNDLIST
*Edmund S. Jacobsen*

Við á framsýningi eru: Edward Fuglø, Astri Luihn, Sigrun Gunnarsdóttir, Torbjørn Olsen, Eyðun av Reyni og Ingálvur av Reyni, sáli.

Framsýningin er ein ferðaframsýning og er fingin í lag av Norðurlandahúsinum í Føroyum. Í 2005 var framsýningin at síggja í Norðurlandahúsinum og í 2006 hevur hon verið á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn og á Trondheim Kunstmuseum – og nú at enda er túrurin so komin til Ísland.

Á framsýningini eru 40 verk, og eru tey øll málningar. Fleiri av hesum eru rættuliga stórir og fyllir framsýningin alt Hafnarborg savnið, sum er í tveimum hæddum.

Myndevnið fevnir frá tí figurativa til tað abstrakta, og er henda framsýningin sostatt eitt gott boð uppá hvussu føroysk samtíðarlist sær út júst nú.

Framsýningin hevur fingið sera góð ummæli, bæði í Noregi og Danmark. Fyrrverandi stjórin í Norðurlandahúsinum í Føroyum, Helga Hjørvar, letur upp framsýningina.

Framsýningin er at síggja til og við 4. feb. 2007. Sí meira á www.hafnarborg.is





## Skrivstovufólk til Pf. Eyðun Jespersen

Søkt verður eftir einum skrivstovufólki, at byrja skjótast gjørligt.



**Starvið**
Starvið fevnir um alt vanligt skrivstovuarbeiði, herundir bókhald, lønir, telefon, tolling v.m. Talan er um eitt starv við niðursettari tíð áleið 20 - 30 tímar um vikuna eftir nærri avtalu. Um tað er neyðugt má umsøkjarin kunnu arbeiða meira. Talan er um eitt áhugavert og sjálvstøðugt arbeiði.

**Førleikakrøv**
Vit hugsa okkum ein persón við skrivstovuútbúgving, HH ella líknandi útbúgving og arbeiðsroyndum á skrivstovu. Harumframt er tað ein fyrimunir um tú:
· Kanst arbeiða sjálvstøðugt.
· Hevur góð samstarvsevni.
· Ert álítandi og tekur ábyrgd av tínum arbeiði.
· Ert arbeiðssamur, røkin og fyrikomandi.

**Vit bjóða**
tær eitt fjølbroytt og áhugavert arbeiði innan skrivstovuyrkið. Pf. Eyðun Jespersen hevur 10 fólk í starvi sum er, og kemur tú at taka tær av alskyns uppgávum og fær harvið gott innlit í nógv viðurskifti.

Virksemið hjá Pf. Eyðun Jespersen er fjøllbroytt innan handil, handverk og ídnað. Tað umfatar m.a. ein elektromekaniskan verkstað, góðkendar kølimontørar og elinnleggjara, sølu av útgerð og tænastum til alivinnuna og sølu av ymiskum el-tilfari.

Vit kunnu bjóða eitt áhugavert arbeiðspláss í menning.Vit hava eitt gott arbeiðsumhvørvi, har tú fært møguleika fyri at seta títt persónliga merki á arbeiðið. Harumframt eru góðir skeið- og eftirútbúgvingarmøguleikar. Løn eftir nærri avtalu.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Hjalmar Jacobsen (hj@lm.fo) ella Leiv Holm (lh@lm.fo) á telefon 35 12 20.

**Umsókn**
saman við avritum av próvskjølum og upplýsingum um arbeiðsroyndir, útbúgving v.m. skulu vera P/F Eyðun Jespersen, Stiðjagøta 4, 100 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi 19. januar 2006.

P/F EYÐUN JESPERSEN

Pf. Eyðun Jespersen Stiðjagøta 4 FO-100 Tórshavn